## Krónan avhildin

Útlendsk ferðafólk, sum koma til Danmarkar, vilja fegin hava tær donsku myntirnar við sær, tá tey fara heimaftur, skrivar JydskeVestkysten. Ein ferðaleiðari sigur við blaðið, at serliga týskarar vilja hava krónurnar sum ferðaminnir, tí tey hava tað vera so sjáldsamt og áhugavert, at eitt so lítið land sum Danmark hevur egnar myntir. Fyri seks árum síðani vóru danir á fólkaatkvøðu um at taka evruna ístaðin fyri krónuna. Svarið var nei.

## Yvirmaður drukkin

Løgreglan í Nordland í Noregi hevur skuldsett ein yvirmann á einari ferju fyri at hava ført skipið, meðan hann var ávirkaður av rúsdrekka. Løgreglan gjørdi eftirlit umborð á ferjuni millum Fiskebøl og Melbu leygardagin, og tað vísti seg, at yvirmaðurin, sum hevði vakt á brúnni, var ávirkaður. Sambært blaðnum VG er tað fyrstu ferð, at løgreglan í Nordland hevur skuldsett ein yvirmann á einari ferju fyri rúsdrekkasigling.

# Sleppur ikki at landa í Føroyum

**Frá ólavsøku til hálvan oktober landaði íslendska skipið „Engey" 9.500 tons av sild til frystingar í Fuglafirði. Tá fiskaði skipið í altjóða og í føroyskum sjógvi. Nú er tað í íslendskum sjógvi, og so sleppur tað ikki at landa í Fuglafirði. Lógin sigur nei**



*„Engey" er størsta fiskiskip í Íslandi. Tað er 105 metrar langt og 20 metrar breitt og kann frysta millum 200 og 250 tons um samdøgrið. Skipið hevur eisini mjølverksmiðju. „Engey" er smíðað í Spania í 1994 og bleiv keypt til Íslands í fjør vár*

FISKIVINNA

*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Partafelagið Bergfrost í Fuglafirði og Fuglafjarðar kommuna hava biðið Jóannes Eidesgaard, løgmann um hjálp. Í brævi til løgmansskrivstovuna harmast felagið og kommunan um, at íslendska skipið „Engey" slappur ikki at leggja sild til frystingar á goymslu hjá Bergfrost longur.

Frá 25. juli til 17. oktober var „Engey" á Fuglafirði við 9.500 tonsum av sild og sildafløkum til frystigoymsluna hjá Bergfrost. Talan er um transitvøru, og tað mesta er síðani avskipað við frystifarmaskipum til onnur lond, og nakað er latið móttakarunum beinleiðis.

Sildina hevði skipið fiskað í altjóða sjógvi og í føroyskum sjógvi, men beint eftir hálvan oktober fór „Engey" í íslendskan sjógv at royna, og síðani hevur skipið ikki verið aftur á Fuglafirði. Ikki tí at Bergfrost ikki vil hava meiri sild, og heldur ikki tí at reiðaríið ikki vil leggja meiri upp í Fuglafirði. „Engey" sleppur ikki at leggja veiðina upp í Føroyum, tí íslendsk lóg bannar tí.

### Hoyvíkssáttmálin

Tað er í hesum sambandi, at Bergfrost og Fuglafjarðar kommuna vilja hava hjálp frá løgmanni. Tey vísa á, at altingslóg nummar 57 frá 3. juni í 1996 bannar íslendskum skipum at landa fisk, sum er veiddur í íslendskum sjóøki, uttanlands. Bergfrost og kommunan halda ikki, at hetta samsvarar við andan í Hoyvíkssáttmálanum um fríhandil landanna millum, og tey vilja tí hava løgmann at virka fyri, at íslendska forðingin verður fingin burtur.

Gunnar Holm Jacobsen, ráðgevi á uttanríkisdeildini á løgmansskrivstovuni, gevur fuglfirðingum rætt í, at landingarbannið er ikki í samljóði við tað yvirskipaða málið við Hoyvíkssáttmálanum. Hinvegin ivast hann í, um bannið er beinleiðis brot á sáttmálan, soleiðis sum hann er háttaður. Og málið er eisini tengt at einum tulkingarspurningi.

- Ein av hornasteinunum í sáttmálanum er vørufrælsi, sum í hesum sambandi merkir, at vøra við uppruna í Føroyum ella Íslandi skal hava frítt at fara millum londini uttan forðingar. Spurningurin er so, nær fiskur kann metast sum ein vøra. Í Føroyum meta vit fisk sum eina vøru í teirri løtu, hann er komin „inn um stokkin", meðan íslendska sjónarmiðið er, at fiskur er ikki ein vøra, fyrr enn hann er landaður og innvigaður á góðkendari innvigingarstøð, sigur Gunnar Holm Jacobsen.

Hann sigur, at løgmansskrivstovan fer at taka málið hjá fuglfirðingum upp saman við fiskimálaráðnum, og tá kemur Hoyvíkssáttmálin á borðið.

–Við Hoyvíkssáttmálanum hava vit fingið ein plattform og eitt amboð, sum kann brúkast í arbeiðinum, fyri at slíkar forðingar verða tiknar burtur, sigur ráðgevin.

### Burturvið

„Engey" hevur landað eina ferð í Íslandi, síðani skipið fór á sild í íslendskum sjógvi. Ta fyrstu tíðina var nakað av sild eystanfyri, men fiskiskapurin har doyði burtur, og nú royna teir vestur av Snæfellsnesi á Vesturlandinum. Teir eru nú á øðrum túrinum, og um vikuskiftið høvdu teir góð 1.500 tons av fløkum. Væntandi fer skipið ikki inn hesaferð, tí ætlanin er at umskipa fløkini umborð á eitt frystifarmaskip.

Tað er felagið HB Grandi í Reykjavík, sum eigur „Engey". Ingimundur Ingimundarson, rakstrarstjóri hjá HB Granda, sigur við Sosialin, at teir vóru sera væl nøgdir við tænastuna, sum skipið fekk í Fuglafirði, og at teir ætlaðu sær á Fuglafjørð við sildini, sum teir fingu á Eysturlandinum, tí tá var líka skjótt at sigla til Føroya sum til Reykjavíkar.

– Men boðini frá myndugleikunum vóru, at tað kundu vit ikki, nú skipið fiskar í íslendskum sjógvi.

– Hvat heldur tú um tað?

– Hatta er óheppið og púra burturvið. Eg skilji hatta ikki.

### Stóran týdning

Í Fuglafirði vóna Bergfrost og kommunan, at „Engey" sleppur aftur hagar at leggja veiðina upp, tí tað hevur stóran týdning. Skipið hevur lagt hálva aðru millión krónur eftir seg, hvørja ferð tað hevur landað, so tær fimm ferðirnar, skipið hevur verið í Fuglafirði, hevur tað lagt 7,5 milliónir krónur eftir seg.

– Hevði tað sloppið at landa ótarnað alt árið, hevði tað kanska lagt einar 30 milliónir krónur eftir seg í Føroyum, meginpartin tó á staðnum, siga Bergfrost og Fuglafjarðar kommuna í brævinum til løgmansskrivstovuna.

Hjá Bergfrost kemur tað illa við, at íslendsk nótaskip ikki kunnu leggja uppisjóvarfisk, sum er veiddur í íslendskum sjógvi, á goymslu sum transitvøru í Føroyum.

Fyri kommununa hevur tað eisini týdning at fáa skipið aftur. Tær fimm ferðirnar, „Engey" hevur lagt upp í Fuglafirði, rindaði tað 260.000 krónur í gjøldum, og tað svarar til eina góða millión krónur árliga.

Allur fiskur, sum íslendsk skip veiða úr stovnum, sum lutvíst ella fult halda til í íslendskum sjóøki, skal landast innanlands og vigast í innlendskari havn.

*(Brot úr altingslóg nr. 57 frá 3. juni 1996)*